Savna góð minnir saman SSP

Góðu foreldur og næmingar í 7. Flokkunum í Tórshavnar kommunu

Sum ein liður í SSP- arbeiðinum á skúlunum og ungdómshúsunum, verða áhugaverdir SSP- dagar fyri allar 7. Flokkar í kommununi 21- 23. feb. 2018.

Evni er " ung og lívið" og lyklaorði verður: Sálarligur trivnaður. Hesar tríggjar dagarnar fara næmingar í 7. Flokkunum at vera saman við sínum floksfeløgum, men fáa samstundis høvi at møta javnaldrum frá hinum skúlunum. Upplegg verður frá lærarum og SSP- lærarum. Næmingarnir arbeiða í bólkum.

Eisini verður fyrilestur við Moniku Mohr og Magna Mohr frá Fólkaheilsuráðnum.

Skráin sær soleiðis út:

Mikudagin 21. Feb. frá 08.00- 13:30: á egnum skúla. Sí tó skránna við fyrilestrum

Hósdagin 22. Feb. frá 08.00-13:30: á egnum skúla. Sí tó skránna við fyrilestrum

Fríggjadagin 23. Feb. frá 09:00- 13:30: Øll møtast í Dansifrøði kl. 09.00 og skulu tey vera ílatin eftir veðrinum, soleiðis at tey kunnu røra seg uttandura.

Fríggjadagin 23. Feb. frá kl. 20:00– 23:00: Ungdómsveitsla/konsert á Reinsarínum. Starvsfólkini frá ungdómshúsunum í kommununi skipa fyri og eru hjástødd alt kvøldið.

Fyrilestrarnir verða hildnir á skúlunum soleiðis:

Mikudagin 21. Feb. frá kl. 08:15- 09:30 fyri næmingum á Eysturskúlanum, Hoyvíkarskúla, Skúlanum við Løgmannabreyt, Velbastaðar skúli, Kaldbaks og Kollafjørð skúla. Næmingarnar møta á skúlanum við Løgmannabreyt kl. 08.00.

Hósdagin 22. Feb. frá kl. 08.15- 09:30 fyri næmingum úr skúlanum á Argjahamri, skúlanum á Fløtum, Gula skúla og Sankta Frans. Næmingarnir møta á skúlanum á Argjahamri kl. 08:00.

Tit fáa nærri boð frá skúlanum um transport til og frá fyrilestrunum.

Næmingarnir hava matpakka og okkurt drekkandi við allir dagar.

Vinarliga heilsan

SSP- samstarvið í Tórshavnar kommunu